# Skulu hava púra greiðar linjur

**Landsstýrið fer nú at gera ein sáttmála við Strandferðsluna, har tað beinleiðis er ásett, hvussu tænastustøðið skal vera og hvørjar skyldur stovnurin skal hava**

STRANDFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*


*Nú skulu Strandferðslan og politikarar altíð vita akkurát, hvar tey hava hvønn annan og tað skuldi verið ein fyrimunur fyri báðar partar*

Nú skal ein beinleiðis sáttmáli gerast ímillum Innlendismálaráðið og Strandferðsluna um, hvussu stovnurin skal virka framyvir.

Landsstýrið hevur í eina tíð arbeitt við at umskipa bygnaðin á Strandferðsluni.

Niðurstøðan er, at nú skal ein samferðsludeild skipast í Innlendismálaráðnum og hendan samferðsludeildin skal so gera samferðslusáttmálar við Strandferðsluna.

- Í hesum sáttmálanum skal tað greitt verða ásett, hvørji krøv, politiska skipanin hevur til Strandferðsluna, hvørja tænastu, hon skal veita og, hvørjar skyldur hon skal hava, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í innlendismálum.

- Aðalmálið við einum slíkum samferðslusáttmála er, at hann skal vera eitt bindandi stýringsamboð fyri bæði politiska myndugleikan og fyri Strandferðsluna, so at báðir partar vita akkurát, hvat teir hava at halda seg til.

Men við einum slíkum sáttmála frásiga politikararnir sær eisini rættin til at leggja seg út í dagliga raksturin, tí sáttmálin førir við sær eitt greitt ábyrgdarbýtið ímillum politiska myndugleikan og Strandferðsluna.

Men samstundis verða krøvini til Strandferðsluna meiri skipað enn tey hava verið.

### Kunnu keypa eykatúrar

Hetta gevur politiska myndugleikanum tíð og orku til at leggja langtíðarætlanir fyri samferðsluna, hvussu tænastustøðið skal vera og hvussu stovnurin skal mennast, stendur í einum uppritið, sum ein bólkur hevur gjørt til landsstýrismannin í hesum sambandi.

Men samstundis ber hetta so eisini í sær, at politiski myndugleikin kann keypa tænastu frá ferð til ferð, tá ið tað er neyðugt.

- Fyri Strandferðsluna er tað eisini avgerandi, at pengar fylgja við, tá ið politikarar seta nýggj krøv, so at rúmd ikki skal finnast á játtanini, sum hon hevur.

Hinvegin er tað ein vansi at tað Strandferðslan ikki verður so liðilig, sum hon hevur verið og at tað fer at vera torførari at broyta ferðaætlan við stuttum skotbrái eitt nú í sambandi við landsdystir og onnur tiltøk.

Hinvegin er endamálið, at í slíkum føri skal tað bera til hjá politiska myndugleikanum at keypa eykatúrar fyri ein ávísan kostnað, stendur í uppritinum.

Men har verður eisini lagt afturat, at skal ein slík skipan virka, er tað ein avgerandi fortreyt, at politiski myndugleikin góðtekur, at hann hevur fingið ein nýggjan leiklut sum meira yvirskipaður partur og at hann sostatt ikki leggur seg út í dagliga raksturin.

Í fyrstu syfti verður hugsað um at gera stuttan sáttmála, ið gongur yvir eitt ella tvey ár .

- Tað gevur útbjóðaranum møguleika fyri at tillaga og broyta óhepnar ásetingar í sáttmálanum, sigur uppritið.

Men tá ið allir partar hava fingið fleiri royndir, er tað ofta ein fyrimunur at gera sáttmálar yvir longri tíðarskeið, tí tað gevur Strandferðsluni betri fortreytir fyri at leggja ætlanir, gera íløgur, seta fólk o.s.fr.

Jacob Vestergaard hevur fyrr nevnt, at hann hevur kannað um tað ber til at einskilja nakrar av teimum smærru leiðunum, men tað skilst á honum, at hetta er ikki nakað, sum liggur í kortunum beint nú.

# Í næsta mánaði verður lættari at fáa útlendingar til Føroyar

**Men Jacob Vestergaard ivast í um tað ger til at ganga krøvunum frá fakfeløgunum á møti um, at útlendingarnir, skulu vera limir í føroyskum fakfelag**

ÚTLENDSK ARBEIÐSMEGI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*


*Útlendingar, sum koma hendavegin at arbeiða, skulu hava somu sømdir sum føroyingar, men eg ivist í um vit kunnu krevja, at teir skulu melda seg inn í føroysk fakfelag, sigur Jacob Vestergaard*

Nú verður skjótt lættari at fáa útlendingar til Føroya at arbeiða.

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í innlendismálum, hevur í eina tíð arbeitt við at gera eina kunngerð, sum skal áseta, hvørjar treytirnar skulu vera fyri at fáa útlendska arbeiðsmegi til Føroyar at arbeiða.

Hugsað verður um, at vinnulívsfólk hava mangan gramt seg um, at tey fáa ikki nóg mikið av arbeiðsmegi.

Tí kundu tey hugsað sær, at tað var lættari at fáa útlendingar til Føroyar at gera ávís arbeiði. Tað skal gerast soleiðis, at skal eitt ávíst arbeiði gerast, skal tað bera til at gera sáttmála við útlendsk arbeiðsfólk um at koma hendavegin at gera tað ávísa arbeiðið og so fara tey avstað aftur.

Jacob Vestergaard sigur, at eftir arbeiðsætlanini, sum nú er, skal hendan kunngerðin verða liðug um miðjan næsta mánað.

### Eftir føroyskum treytum

Í hesum sambandi hevur tað verið eitt krav frá arbeiðarafeløgunum, at teir útlendingar, sum koma hendavegin, skulu arbeiða eftir føroyskum sáttmálum og fyri føroyska løn. Men fyri at kunna hava eftirlit við tí, hava tey eisini kravt, at útlendingarnir skulu vera limir í føroyskum fakfeløgum.

Arbeiðarafeløgini stúra nevniliga fyri, at útlendingar skulu koma hendavegin at arbeiða fyri løn, sum er galdandi í heimlandinum og at teir sostatt fara at máa støðið undan teimum rættindum, sum føroysku fakfeløgini hava stríðst fyri tað mesta av eini heilari øld.

Jacob Vestergaard sigur, at tað verður eitt krav, at útlendingarnir skulu arbeiða eftir teimum sáttmálum, sum eru galdandi í Føroyum og fyri tað løn, sum er galdandi í Føroyum.

Hinvegin ivast hann í um tað ber til at krevja, at útlendingarnir skulu vera limir í føroyskum fakfeløgum.

Hann vísir til dómin í mannarættindadómstólinum í Strasburg, har tað er ásett, at tað er ólógligt at krevja, at fólk skulu vera limir í fakfeløgum.

- Tað veit eg ikki um tað ber til at krevja, sigur Jacob Vestergaard.

*Hvussu ber so til at hava eftirlit við um tey arbeiða eftir treytunum í føroyskum sáttmálum?*

Eftirlitsmyndugleikin, sum er løgreglan, kann altíð kanna eftir, hvørja løn tey fáa. Og verður søkt um at fáa arbeiðs- og uppihaldsloyvi longt, verður kannað eftir, hvat tey hava forvunnið og samsvarar tað ikki við føroysk viðurskifti, verður loyvið ikki longt.

Men møguliga ber eisini til at seta sum treyt, at serligt eftirlit kann vera við, hvat tey forvinna.

Men nú hoyra vit viðhvørt um, at eitt er, hvat fólk forvinna, men so verður lønin tikin inn aftur í okursleigu og upp á aðrar mátar. Tað merkir, at á pappírinum er alt, sum tað skal, men í veruleikanum fáa tey undirløn?

- Tað er ein spurningur, sum eftirlitsmyndugleikin má taka sær av, eins og hann má taka sær av, at treytirnar annars verða hildnar, sigur Jacob Vestergaard.

# Kravið um limaskap er einasta loysn

**Arbeiðarafløgini fara ikki at víkja frá kravinum um, at útlendingar, sum koma higar at arbeiða, skulu vera limir í føroyskum fakfelag**

ÚTLENDSK ARBEIÐSMEGI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*


*- Vit fara ikki at góðkenna eina útlendingakunngerð, har tað ikki er eitt krav, at teir skulu vera limir í føroyskum fakfelag, staðfestir Ingeborg Vinther*

- Vit fara ikki at víkja frá kravinum um, at teir útlendingar, sum koma til Føroyar at arbeiða, skulu vera limir í føroyskum fakfelag.

Tað ger Ingeborg Vinther, forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag, púra greitt.

Tað ger hon greitt, eftir at Jacob Vestergaard aðrastaðni her á síðuni, ivast í um tað ber til at krevja, at útlendingar skulu limast inn í føroysk fakfeløg.

Men arbeiðarafeløgini fara at leggja doyðin á at forða fyri, at útlendingar, sum koma hendavegin, ikki máa støðið undan teimum føroysku sáttmálunum.

Og tað kann bara gerast við, at útlendingarnir verða limir í føroyskum fakfelag.

- Teir mugu verða limir í føroyskum fakfelag, so at vit kunnu tryggja, at teir fáa allar sømdir, sum hoyra til føroyska arbeiðsmarknaðin og so at teir ikki máa støðið undan okkara sáttmálum, sigur Ingeborg Vinther.

Tí fer Føroya Arbeiðarafelg ikki at góðkenna eina útlendingakunngerð, har tað ikki er eitt krav, at útlendingarnir verða limir í føroyskum fakfelag.

Hon kennir til dómin í Strasburg, sum landsstýrismaðurin sipar til í aðrari grein her á síðuni.

- Men tað er ongin ivi um, at er vilji til tað, ber eisini til at finna eina loysn.

Hvat fer at henda, vissi treytin um limaskap í føroyskum fakfelag ikki er við í kunngerðini, kann hon ikki siga nakað um enn.

- Tað verður ein støða, sum vit fara at taka upp, tá ið hon er íkomin, sigur hon.

Hon gevur lítið fyri ætlanina um, at Løgreglan skal hava eftirlit við hesum viðurskiftum.

- Løgreglan gremur seg dag og dagliga um, at tey hava ikki størri orku til at síggjast á gøtunum og tí dugi eg ikki at hugsa mær, hvussu løgreglan skal hava dagligt eftirlit við at, rættindi hjá útlendingum á føroyska arbeiðsmarknaðinum, verða vird.

- Tí er kravið um limaskap í føroyskum fakfelag einasta loysnin, sigur hon.

Men Arbeiðarafeløgini fara eisini at krevja, at útlendingarnir skulu ikki hava betri rættindi enn føroysk arbeiðsmegi hevur.

- Tað skal ikki vera so, at útlendsk arbeiðsmegi skal hava trygd fyri fullari arbeiðsmegi, tí tað hevur føroysk arbeiðsmegi ikki. Verður tað kravið, verða tað nógv føroysk verkafólk, sum koma at sita heima og tað verður ikki góðtikið, sigur hon.